# Hósdagur 9. mars

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Kjartan Mørkøre í Havn lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Kári Olsen er vertur
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Kjartan Mørkøre í Havn lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Føroyski fiskivinnubýurin í Norðurjyllandi** (e) - Kári Durhuus og Per Højgaard leggja til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Norðbúgvar í Amerika** (e) - Árni Joensen skrivar. Jógvan Arge lesur. Onnur sending.
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Hilmar Jan Hansen leggur til rættis
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Dalurin fagri** - 6. partur av skaldsøgu eftir Gunnar Hoydal. Hans Tórgarð lesur.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið** - Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.00 **Brot og bitar** (e)
14.30 **Norðurlendskur tónleikur**
15.30 **Barnaløtan**
17.00 **Lovsangur**
18.00 **Bønartænastan**
19.00 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
20.00 **Barnaløtan** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð**(e) **- Lovsangur**
21.00 **Bønarlinjan** v/ ym. luttakarum
23.00 **Vit gevast**

**Rás 2 FM 102**

9.00 **Lættur tónleikur**
9.45 **Orðið** - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis** - Beinleiðis sending við tónleiki og práti. - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Middagstónleikur**
13.00 **Norðlendskur tónleikur**
14.00 **A String of Pearls** - Ib Glindemann and his Orchestra v/ donskum sangarum
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Tónleikur**
16.00 **Seinnapartur** - Løtt innsløg. Smátíðindi. Tónleikur.
17.00 **Barnatímin** - Oddbjørg og Lizzi leggja til rættis
17.30 **Barnasangir**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Nátturðatónleikur**
19.00 **Highway 83** - Miðlabreytin. - 10. flokkar í Havn leggja til rættis.
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Tónleikur frá 90'árunum**
22.00 **Jukebox** - Lurtarin velur løgini. Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@post.olivant.fo
23.00 **Orðið**(e) **-** Bíbliulestur v/ Anju Hansen

**svf**

18.15 **Upp á tá** 4
18.30 **Øskufía** 10:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **20. øld** 7:12 - ensk dokumentarrøð
21.45 **Krimitímin: Ruth Rendell: Heartstones** 2:2
22.35 **Ferðafrásøgn: Ekvador og Galapagos**
23.20 **Kvinnurnar hjá mafiuni** - ensk dokumentar48
00.10 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Nordic Combined Skiing**
9.00 Live - **Biathlon**
10.30 **Cross-Country Skiing**
11.30 **Speed Skiing**
12.00 Live - **Biathlon**
13.45 Live - **Cycling**
16.00 **Biathlon**
17.00 Live - **Alpine Skiing**
18.00 **Biathlon**
19.00 **Alpine Skiing**
19.45 Live - **Alpine Skiing**
20.30 **Boxing**
21.30 **Football**
23.30 **Cycling**
0.30 **Close**

**3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **Alle tiders barnepige**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Hun så et mord**
10.55 **Horton-sagaen**
11.45 **Horton-sagaen**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Sjov og Spas**
13.30 **Panter-tanter**
14.00 **Det lille hus på prærien**
14.55 **Interne affærer**
15.50 **Sjov og Spas**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Sabrina - skolens heks**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst**
20.00 **Gitte og Camilla i sneen**
20.30 **Heksene fra Warren Manor**
21.30 **SexOrama**
22.00 **Alle tiders barnepige**
22.30 **Dagens Nyheder på TV3**
22.40 **Drew Carey**
23.05 **Vore værste år**
23.35 **I lyst og nød**
0.05 **Ti tommelfingre**
0.35 **Monty Pythons flyvende cirkus**
1.10 **Ellen**
1.35 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.05 **Hvide Løgne**
2.35 **Godnat**

**BBC World**

0.00 **World News**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News**
1.30 **Holiday**
2.00 **News**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News**
5.30 **How Buildings Learn**
6.00 **World News**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report**
13.30 **The World Today**
14.30 **How Buildings Learn**
15.00 **World News**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News**
20.30 **Earth Report**
21.00 **World News**
21.30 **World Business Report**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

0.00 **TLZ: »The American Dream – The Bottom Line«**
1.00 **TLZ: »Mad about Music«**
1.30 **TLZ: »Artifax«**
2.00 **TLZ: »A Source of Inspiration«**
2.30 **TLZ: »Empowerment«**
3.00 **TLZ: »News and the Democratic Agenda«**
3.30 **TLZ: »Playing Safe«**
4.00 **TLZ: »Le Cafe des Reves«**
4.20 **TLZ: »Jeunes Francophones – Les Media«**
4.40 **TLZ: »Jeunes Francophones – Je t'aime«**
5.00 **TLZ: »The Business – The Laundrymen«**
5.30 **TLZ: »Ozmo English Show«**
6.00 **Noddy: »Noddy and the Missing Hats«**
6.10 **William's Wish Wellingtons: »William and Barksure«**
6.15 **Playdays: »The Playground Stop«**
6.35 **Run the Risk**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Tap Dancers«**
8.20 **Change that**
8.45 **Kilroy**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
11.00 **TLZ: »Muzzy Comes Back«**
11.30 **Ready, Steady, Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that**
13.00 **Style Challenge**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Ready, Steady, Cook**
15.00 **Noddy: »Noddy and the Missing Hats«**
15.10 **William's Wish Wellingtons: »William and Barksure«**
15.15 **Playdays: »The Playground Stop«**
15.35 **Run the Risk**
16.00 **The Biz**
16.30 **Top of the Pops Plus**
17.00 **Last of the Summer Wine: »A Clean Sweep«**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »Vets get Married«**
19.00 **The Brittas Empire: »Pregnant«**
19.30 **Blackadder goes Forth: »Plan E - General Hospital«**
20.00 **Casualty**
21.00 **Absolutely Fabulous: »Jealous«**
21.30 **Top of the Pops Plus**
21.55 **Bright Hair**



***TV3 - Hósdagin kl. 20.00:***

## Gitte og Camilla i sneen

Í Val Thorens í Fraklandi fara genturnar á karaoke-bar, og her er ikki eitt eyga turt. Størsta skibumsakollektivið í Alpunum fær vitjan av gentunum báðum, og hetta endar alt í hvítum ruðuleika. Camilla roynir eisini at flúgva yvir fjøllunum í heitluftsballónum, áðrenn tær eisini royna luksus tilveruna á slíkum ferðum.

***TV3 - Hósdagin kl. 20.30:***

## Heksene fra Warren Manor

Amerikonsk ræðuraðsending (Charmed) Náttklubbanum hjá Piper gongst ikki so væl, og genturnar verða noyddar at biðja um eitt lán frá einum lokalum vinnulívsmanni. Leo heldur, at málið málið kann loysast við at lata bólkin, Dishwalla, spæla til dans, men limirnir í bólkinum hava eitt óhugnaligt loyndarmál, sum systrarnar skjótt finna út av.



***TV3 - Hósdagin kl. 21.30:***

## SexOrama

Erotisk dokumentarsendirøð

Hvussu verður við kærleika og sex í framtíðini? SexOrama roynir at spáa um framtíðar erotiska lívið hjá dønum, tí eru vit á veg burtur frá erotikkinum, ella gerast vit betri til hetta, so hvørt sum vit síggja meira og meira í gerandisdegnum? Er tað nóg mikið við sex á alnetinum og sjónvarpinum, har vit síggja onnur spæla sær á lakinum, ella eru vit í ferð við at drepa neistan? SexOrama roynir at svara hesum spurningum, samstundis sum hugt verður at framtíðini.







Viðmerking:

# Hvussu heitur er føroyski búskapurin

*Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, heldur, at Búskaparráðið kemur til skeivar niðurstøðu í seinastu frágreiðing síni. Hetta gera teir, tí analysurnar hjá teimum eru ikki nøtkandi*

Nakað av tjaki hevur verið í seinastuni um frágreiðingina hjá búskaparráðnum. Tjakast hevur serliga verið um uppskotið um fiskidagamarknað, meðan hin parturin av frágreiðingini, sum er um konjunkturgongdina í løtuni, stórt sæð ikki hevur verið umrøddur. Í hesi greinini verður farið eitt sindur inn á analysurnar í konjunkturpartinum fyri at hyggja nærri at um niðurstøðan, um at búskapurin hevur ov nógva ferð, eru røtt.

### Frágreiðingin

Niðurstøðan í frágreiðingini frá búskaparráðnum er tann, at føroyski búskapurin hevur ov nógva ferð og eigur avgjørt at tálmast. Metingin er serliga gjørd út frá lønartølum og sethúsaprísunum.

### Lønartølini

Á fyrstu síðu í frágreiðingini stendur: "Tølini fram til november 1999 góvu ikki nýggjar orsøkir til at tátta í búskaparliga, men desember lønargjaldingarnar vóru sera stórar. Um desembertølini eru brot á ta gongdina, sum var fram til november, so eigur at vera tátta í longu tíðliga í vár." og á síðu 3 stendur: "Nýggjastu tølini geva orsøk til álvarsliga at umhugsa at tátta í búskaparliga".

Niðurstøðan er sostatt, at sjálvt um tølini fram til november ikki geva nakra orsøk til at tátta í, so vóru desember lønargjaldingarnar so stórar, at tað eigur at vera tátta í búskaparliga. Tað átti at verið óneyðugt at sagt, at eingin analysa má taka støði í einum einstøkum mánaði. Sjálvsagt eigur tú at hyggja eftir einum samlaðum tíðarskeiði, fyri at meta um gongdina. Serliga í einum lítlum samfelagið eigur eingin mánaður at standa fyri seg sjálvan, tí sveiggini frá einum mánað til annan eru so stór.

Harumframt eru Føroyar eitt fiskivinnusamfelag, har avreiðingarnar og harvið lønargjaldingarnar kunnu vera stórar ein mánað, fyri so at vera minni næsta mánað. At enda er talan um desember mánað, jólamánaðin, har handlarnir taka eyka arbeiðsmegi inn í sambandi við jólasøluna.

Um nakað, so átti búskaparráðið at sagt, at desember mánaður er so øðrvísi, at einki haldfast kann sigast út frá hesum og tí síggja vit burtur frá lønargjaldingunum í desember. Harvið hevði niðurstøðan verið — og vit endurtaka sitatið frá fyrr av: "Tølini fram til november 1999 góvu ikki nýggjar orsøkir til at tátta í búskaparliga."

Hetta er ein heilt onnur niðurstøða enn tann búskaparráðið sjálvt kemur við í frágreiðingini, og sum verður endurtikin ferð eftir ferð í frágreiðingini.

### Sethúsaprísirnir

Eitt annað, sum búskaparráðið nýtir til at rættvísgera niðurstøðuna við, eru tølini fyri sethúsaprísirnar. Á fyrstu síðu stendur: "Arbeiðsloysið minkar framvegis, og í summum vinnum eru nú tekin um fløskuhálsar. Í byggivinnuni er til dømis sera nógv virksemi, og hetta sæst aftur í húsaprísunum, sum eru hækkaðir nógv seinasta árið."

Analytiskt er tað ikki rætt at siga, at tað er tað stóra virksemi í byggivinnuni, sum fær húsaprísirnar at hækka. Sjálvandi er tað ikki so tað hongur saman. Tað er tann økti eftirspurningurin eftir húsum, sum fær húsaprísin at hækka og sami eftirspurningur setur gongd á sethúsabyggingina og harvið økist virksemi í byggivinnuni.

Sambært sitatinum omanfyri er mest álvarsami fløskuhálsur vantandi arbeiðsmegi innan byggivinnuna. Eg eri samdur í hesum. Hetta er nakað tú sært aftur í øllum londum, at byggivinnan hevur ilt við at fáa nokk av arbeiðsmegi í einum hákonjunkturi og tí fært tú fløskuhálsar. Spurningurin er bert um fløskuhálsurin er veruligur, t.e. um tað veruliga er mangul á arbeiðsmegi innan byggivinnuna.

Á myndini á síðu 9 í frágreiðingini sæst gongdin á sethúsaprísinum í Tórshavn og fyri alt landið. Ongin ivi er um, at sethúsaprísurin í Tórshavn er vaksin munandi meriri enn meðalprísurin fyri alt landið. Hetta kemst av at flytingin inn í landið eftir kreppuna hevur mest verið til Tórshavn og tískil er eftirspurningurin eftir íbúðum í Tórshavn vaksin nógv og harvið er sethúsaprísurin og sethúsabyggingin í Tórshavn vaksin. Talan er sostatt um ein lokalan fløskuháls og ikki um ein fløskuháls fyri alt landið.

Fløskuhálsurin kann tó vera álvarsamur, sjálvt um hann bert er í Tórshavn. Tórshavn er hóast alt ein sera stórur partur av búskapinum. Um vit hyggja nærri eftir myndini yvir sethúsaprísirnar sæst, at prísurin als ikki er øktur serliga nógv seinastu trý árini. Heldur er talan um, at hann er komin upp á eina príslegu og sær ikki út til at broytast stórvegis framyvir. Hetta samsvarar ikki væl við at búskapurin skal vera komin inn í eina yvirupphiting.

Vit kunnu eisini spyrja hvat tað er fyri ein príslega vit eru komin upp á. Við at samanlíkna við prísin í 80'unum sæst at støðið er nakað tað sama sum í 1986-87, tvs. áðrenn búskapurin bleiv heilt heitur í endanum av 80'unum. Um vit nú taka hædd fyri at eisini sethúsaprísurin hevur eina "inflatión" í sær, soleiðis at vit siga at sethúsaprísurin skal hava loyvi at hækka eini 2,5 % um árið, sum er lægri enn tað sum prísvøksturin hevur verið seinastu árini, so er sethúsaprísurin í dag lægri enn hann var í 1985. Tvs. at sjálvt um eftirspurningurin eftir húsum er øktur munandi seinastu árini, so er prísurin í dag enn lægri enn hann var í 1985. Neyvan kann sigast at sethúsaprísurin gevur tekin um at búskapurin er yvirupphitaður.



– Analytiskt er tað ikki rætt at siga, at tað er tað stóra virksemi í byggivinnuni, sum fær húsaprísirnar at hækka. Tað er tann økti eftirspurningurin eftir húsum, sum fær húsaprísin at hækka og sami eftirspurningur setur gongd á sethúsabyggingina og harvið økist virksemi í byggivinnuni. sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur



### Skatturin

Skatta- og avgjaldshækkingar verða nevndar sum eitt amboð, ið kann nýtast til at tálma vøksturin við. Á síðu 3 stendur:

"Í evsta føri kann geast neyðugt við skatta- og avgjaldshækkingum. Hetta er ein loysn, sum landsstýrið eftir ráðsins tykki, so vítt møguligt ikki skal nýta, tí skattatrýstið er eisini við til at skapa lønartrýst og prísvøkstur og harvið versnandi kappingarføri. Generellar skatta- og avgjaldshækkingar raka helst fyrst og fremst innflutningin, heldur enn virksemið í Føroyum, og eru tí ikki so málrættað móti at linka trýstið á arbeiðsmarknaðinum."

Um ein skattahækking ikki er við til at linka trýstið á arbeiðsmarknaðinum, men í staðin er við at økja um lønartrýstið, hví so ikki gjøgnumføra ein ordiliga skattalækking??? Hetta hevði jú ikki ávirka arbeiðsmarknaðin, men hevði minkað munandi um lønartrýstið, soleiðis at kappingarførið hevði blivi munandi betur.

Hetta sigi eg í skemti, tí tað er eyðsæð at samanhangurin ikki er so sum búskaparráðið sigur. Um skatturin hækkar, minkar inntøkan hjá fólki og harvið minkar eftirspurningurin í samfelagnum. Hetta hevur sjálvsagt árin á arbeiðsmarknaðin, soleiðis at lønartrýstið minkar og ikki økist. Av tí at inntøkan hjá fólki minkar, so eru møguleikarnir fyri at fáa fígging til íløgur í vinnulívið verri, og íløguhugurin minkar, tískil gerst kappingarførið verri tá skatturin hækkar.

Annars er tað óhugnaligt at lesa á síðu 3: "Niðanfyri eru nevnd nøkur strukturell tiltøk, sum landsstýrið undir øllum umstøðum eigur at fremja uttan mun til gongdina, men sum helst eiga at verða framskundað, soleiðis sum gongdin er í løtuni. Um vøksturin stendur við, so verður helst eisini neyðugt at útskjóta og toyggja almennar íløgur." Eg kundi ikki lata vera við at lesa tað øðrvísi enn so, at um ein rest av búskaparvøkstri er eftir, aftaná øll hini tiltøkini, so er neyðugt at gera eitthvørt afturat fyri at tryggja okkum at eingin vøkstur verður eftir. Vanliga royna búskaparfrøðingar at finna út av hvussu vit kunnu tryggja okkum so høgan búskaparvøkstur sum gjørligt, og ikki royna at finna út av hvussu vit kunnu beina fyri vøkstrinum.

### Arbeiðsloysi

At enda vil eg knýta eina viðmerking til umrøðuna av arbeiðsloysinum í frágreiðingini. Á síðu 8 stendur, at arbeiðsloysið nú er umleið 6% og tískil er arbeiðsloysið næstan burtur.

Eg vóni ikki at vit í Føroyum gerast nøgd við at hava eitt arbeiðsloysi á 6% og samstundis siga at búskapurin er yvirupphitaður. Sjálvandi vil eitt ávíst arbeiðsloysi altíð vera í einum búskapi, sum hjálpir fólki, ið eru vorin arbeiðsleys, men hetta skuldi gjarna ikki verið heili 6%.

### Niðurstøðan

Mín niðurstøða er sostatt, at eg ikki haldi analysuna hjá búskaparráðnum vera nøktandi og hetta hevur samstundis við sær, at eg meti at niðurstøðan hjá búskaparráðnum er skeiv.

Búskaparráðið metir at føroyski búskapurin er yvirupphitaður og at neyðugt er at tátta í fyri at fløskuhálsarnir ikki skulu gerast ov álvarsamir. Eg meti tvørturímóti, at búskapurin hevur ikki ov nógva ferð sum støðan er í dag, men er farin frá at vera øskukaldur til at hava ein ávísan temperatur. Hervið meini eg eisini, at tað ikki er neyðugt at fremja tiltøk, sum avmarka búskaparvøksturin.

Sjálvandi eiga vit altíð at ansa eftir at búskapurin ikki verður yvirupphitaður, og tí skal henda viðmerkingin frá mær ikki skiljast so, at eg meini at vit bara kunnu gera akkurát sum vit vilja í løtuni og gera allar tær íløgurnar vit hava hug til. Sjálvandi skulu vit ansa okkum og spjaða íløgurnar yvir eitt ávíst áramál.

**Magni Laksáfoss**
**Búskaparfrøðingur**